# Ingeborg lovar at seta hart ímóti hørðum

**Endar sáttmálatrætan við arbeiðsgevararnar við arbeiðssteðgi, fara vit at seta hart ímóti hørðum og fara ikki at geva eitt tað einasta undantaksloyvi, sigur forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag. Men Smyril verður ikki lagdur**

SÁTTMÁLATRÆTA
*Áki Bertholdsen*
aki@sosialurin.fo



*- Endar ósemjan við arbeiðssteðgi, fara vit at seta hart ímóti hørðum og her verður ongin slingur í valsinum, ger Ingeborg Vinther púra greitt, longu áðrenn semingsroyndirnar byrja í morgin*

- Endar hetta við arbeiðssteðgi, fara vit at seta hart ímóti hørðum.

Samráðingarnar ímillum arbeiðsgevararnar og tey fimm arbeiðarafeløgini um nýggjan sáttmála, eru slitnaðar og semingsmenninir eru boðsendir.

Men Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag, ger longu nú greitt, at enda semingsroyndirnar eisini úrslitaleysar, so at arbeiðssteðgur verður, fara arbeiðarafeløgini at seta hart ímóti hørðum.

Semingsmenninir skulu hava sín fyrsta fund við partarnar í morgin, hósdagin og tá fer hann uttan iva at útseta eitt møguligt verkfall í eina viku.

Men longu áðrenn semingsroyndirnar byrja, staðfestir Ingeborg Vinther, at endar hetta við arbeiðssteðgi, hava arbeiðarafeløgini sett sær fyri at gera arbeiðssteðgin so effektivan sum gjørligt frá allar fyrsta bríksli.

- Tað merkir, at vit hava longu gjørt okkum greitt, at vit fara ikki at geva eitt tað einasta undantaksloyvi, skuldi hetta enda við arbeiðssteðgi.

Ingeborg Vinther sigur, at hvørja ferð, arbeiðssteðgur er, plaga arbeiðarafeløgini at fáa ein hóp av umsóknum um undantaksloyvi til alt handa slag av arbeiði ella flutningi, sum er rakt av arbeiðssteðginum.

- Men hesuferð hava vit sett okkum fyri, at arbeiðsgevarar og onnur kunnu akkurát tað sama spara sær at ringja til okkara at biðja um undantaksloyvi, tí vit eru samd um, at umsóknirnar verða afturvístar uttan himpr.

Ingeborg Vinther sigur, at hetta eru fakfeløgini samd um fyri at gera arbeiðssteðgin so effektivan og sostatt eisini so stuttan sum gjørligt.

- Fara vit at geva eftir her og har og at geva undantaksloyvið av ymsum slagi, máar tað bara støðið undan arbeiðssteðginum og er bara við til at gera hann drúgvari enn neyðugt er.

Annars hava arbeiðarafeløgini eina avtalu við arbeiðsgevararnar um at undantak skal gevast til at berja niður sjúku í alibrúkum, so í slíkum føri, sleppa limirnir í arbeiðarafeløgunum til arbeiðis.

Annars verður undantaksloyvi bara givið, har vandi er fyri lívi og heilsu.

- Men annars verða ongi undantaksloyvi givin, tí hesuferð leggja vit so harða linju, sum ongantíð áður, staðfestir Ingeborg Vinther.

- Tað hava tey fimm arbeiðarafeløgini sett okkum fyri og har er ongin slingur í valsinum. Hesuferð skal ongin gera sær nakrar sum helst vónir um, at tað verður sum seinast, leggur hon afturat.

### Smyril sleppur at sigla

*Nú hevur ofta verið átalað, at hvørja ferð arbeiðssteðgur er, verður Smyril lagdur lamin. Eisini tá ið arbeiðssteðgur er hjá arbeiðarafeløgunum, tí teir, sum binda og loysa Smyril, bæði í Havn og í Suðuroy, eru limir í arbeiðarafeløgunum?*

- Smyril er okkara koyrivegur ímillum Suðuroy og Havnina, so hann verður ikki lagdur, staðfestir Ingeborg Vinther.

Sostatt staðfestir hon, at hóast Smyril av røttum átti at verðið lagdur, eru feløgini sinnað at lata hann sigla sum vant.

Tað hava arbeiðarafeløgini eisini gjørt áður, so hetta verður fylgt upp aftur hesuferð, kemur tað so langt.

- Men treytin verður, at Smyril ikki tekur farm við. Hann skal bara flyta ferðafólk og vanligar bilar, sigur hon.

Áður, tá ið Smyril er sloppin at sigla, hóast arbeiðssteðgur hevur verið, hava nógvar royndir verið gjørdar at síkja farm umborð.

Men hesum hevur Ingeborg fleiri ferðir ávarað staðiliga ímóti, tí verður undantaksloyvið misbrúkt, kann tað henda, at undantaksloyvið eisini verður tikið frá Smyrli.

### Fyrireika seg

Hóast Ingeborg Vinther vónar, at tey fáa eina semju í friði og náðum, eru arbeiðarafeløgini longu farin at fyrireika seg til tað ringasta.

Í hesum sambandi hava tey havt fund við lyklafólk í øllum landinum.

- Vit hava havt fund við okkara lyklafólk um alt landið, sum øll eru til reiðar at samskipa tiltøk, hvør í sínum øki, verður tað neyðugt.

- Og tey vita akkurát, hvørjar uppgávur, hvør hevur, endar hetta við verkfalli ella verkbanni fyri at arbeiðssteðgurin kann verða so effektivur og sostatt eisini so stuttur sum gjørligt, sigur forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag.

---

# Eru til reiðar at binda frið í trý ár

**Arbeiðarafeløgini eru til reiðar at gera eina sáttmála við arbeiðsgevararnar sum tryggjar frið á arbeiðsmarknaðinum í trý ár. Afturfyri vildu tey hava 15 krónur meir um tíman tilsamans**

SÁTTMÁLATRÆTA
*Áki Bertholdsen*
aki@sosialurin.fo

- Nú er tað neyðugt at tímalønt fáa eina munandi lønarhækking.

Tað sigur Ingeborg Vinther.

Forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag sigur, at tiskil hava arbeiðarafeløgini kravt, at tímalønin skal hækka fimm krónur um árið.

Afturfyri vórðu tey sinnað at gera ein trý ára sáttmála, sum er eitt ár longri enn vanligt.

Sostatt kravdu tey, at tímalønin skuldi hækka 15 krónur tilsamans.

- Hetta hevði tryggjað arbeiðsfriðin í trý ár og tað er í samsvari við rákið nú á døgum, bæði í Føroyum og í londunum rundanum okkum.

- Tað átti eisini at verið ein stórur fyrimunur hjá virkjunum, sum gevur teimum heilt aðrar møguleikar at leggja til rættis.

- Men tað er greitt, at vit gera ikki ein trý ára sáttmála, fáa vit ikki eina munagóða lønarhækking afturfyri, sigur hon.

Umframt lønarhækkingina vilja arbeiðarafeløgini hava eitt prosent afturat í eftirløn um árið, til eftirlønin er komin upp á 15% av lønini, soleiðis sum landsstýrið hevur boðað frá, er ein hóskandi eftirløn.

Sáttmálasamráðingar hava verið ímillum arbeiðarafeløgini og arbeiðsgevararnar seinastu vikurnar, men tað endaði úrslitaleyst og tí er semingsmaðurin boðsendur.

Ingeborg Vinther vil ikki siga, hvat mótspælið frá arbeiðsgevarunum var.

Men hon staðfestir, at tað er rættiliga langt ímillum partarnar.

Hon staðfestir eisini, at kravið frá arbeiðarafeløgunum er so lagaligt, at har er onki at slaka av.

- Vit hava staðfest, at keypiorkan hjá verkafólkið hevur staðið í stað seinastu árini, samstundis sum tey betri løntu hava fingið væl størri keypikraft.

Samstundis staðfesta vit, at keypiorkan hjá øllum teimum, sum ikki hava fulla tíð á fiskavirkjum og aðrastaðni, hava minni keypiorku nú, enn tey hava havt.

Ingeborg Vinther sigur, at tí má tímalønin hækkast nú, so at vit kunnu byrja at javna munin út ímillum lønarbólkarnir.

Av tí at tað er so langt ímillum partarnar, veit Ingeborg Vinther ikki um hon skal vænta, at tað eydnast at finna eina loysn í sátt og semju, hóast hon vónar tað besta.

### Hava lovað at tiga

Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum vil ikki siga, hvat tilboðið frá arbeiðsgevarunum var.

- Semingsmenninir hava álagt okkum ikki at siga nakað, so vit tiga, sigur hann.

Hann staðfestir kortini, at langt er ímillum partarnar.

- Krøvini frá arbeiðarafeløgunum er ein hækking upp á 18,5% tilsamans hesi trý árini, sigur Jan Mortensen.

Og tað er meiri enn arbeiðsgevararnir halda vera ráðiligt.

Í ár eru nakrir sáttmálar gjørdar á almenna arbeiðsmarknaðinum og teir liggja allir um 3% um árið.

*Kunnu vit so gita, at tykkara tilboð til arbeiðarafeløgini hevur ligið har á leið?*

- Tit kunnu gita sum tit vilja, men tit fáa onki svar, sigur Jan Mortensen.